ítróttur

Nr. 246 • hósdagur • 23. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Noreg-Føroyar 36-23(22-14)

# Ov nógv mistøk

**Tað kostaði føroyska manslandsliðnum dýrt, at teir nakað fyri hálvleik í dystinum móti Noreg týskvøldið gjørdu eina rúgvu av mistøkum, tí tá fekk Noreg lagt sjógv millum seg og føroyska liðið**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Føroyar taptu greitt fyri Noreg í fyrra dystinum sínamillum, sum var leiktur í Rykkinhallen nakað uttan fyri Oslo týskvøldið. Føroyingarnir byrjaðu annars dystin sera væl, og tá ið 20 minuttir vóru leiktir, vóru okkara menn við yvirlutan og vóru á odda 10-9.

### Kostnaðarmiklir 10 minuttir

Seinastu 10 minuttirnir av fyrra hálvleiki gjørdust tó sera dýrir fyri føroyska liðið, tí tá skoraðu norðmenn ikki færri enn 13 ferðir, meðan okkara einans fingu fýra mál hesa løtuna. Tískil kundu norsku vertirnir fara til hálvleiks við eini greiðari leiðslu, 22-14, og so var dysturin í veruleikanum avgjørdur.

Eftir hálvleikssteðgin royndi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Gerster, at broyta eitt sindur upp á taktikkin, so at føroyska verjan gjørdist nógv meiri offensiv, men hetta var ikki nóg mikið til at steðga heimaliðnum.

Heldur hinvegin útbygt leiðsluna hjá sær nakað, og tað var týðuligt, at føroyska verjan manglaði nakrar stórar mans í miðverjuni, sum kundu taka dystin upp við stóru norsku skjúttarnar.

### Mistøk og nervar

Beint eftir dysten týskvøldið fingu vit fatur á Henrik Gerster, landsliðsvenjara, og í telefonini úr Noreg segði hann, at tað kostaði føroyska liðnum dýrt, at teir bráddliga fóru at gera eina rúgvu av mistøkum, tá ið teir annars vóru á odda, og samstundis gjørdust teir fjáltursstungnir. Hetta gjørdu norsku vertirnir sær dælt av beinan vegin, og so var mótbrekkan ov tung fyri føroyska liðið.

– Vit gjørdu alt ov nógv mistøk hesa løtuna, og av tí sama gjørdust leikararnir nervøsir, og tað kostar. Tað er einki at ivast í, at leikararnir serliga hesa løtuna lærdu, at tá ið tú spælir móti liðum á hesum støði, so verða øll mistøk revsaði beinanvegin, sigur Henrik Gerster.

Føroyski landsliðsvenjarin fýlist eisini á, at alt ov nógvir opnir møguleikar vóru misnýttir. - Í slíkum dystum hevur tú ikki ráð til at brenna eini 10 opnar málmøguleikar, soleiðis sum vit gjørdu í dag, og tað er heldur ikki nóg gott, at teir fáa loyvi til at skora eini 15 mál upp á kontraálop, sigur Henrik Gerster.

### Sámal og Halgir manglaðu

Sambært føroyska landsliðsvenjaranum, so var tað serliga í miðverjuni, at føroyingarnir høvdu stórar trupulleikar við vælvaksnu norðmonnunum. - Tað er einki at ivast í, at høvdu vit havt teir báðar, Halgir Dahl-Olesen og Sámal Joensen við, sum eru eftir í Føroyum vegna skaða, so hevði verjan hjá okkum staðið seg nógv betur, og harafturat høvdu vit havt fleiri streingir at spæla upp á í álopspartinum, sigur Henrik Gerster.

Eisini Heini Bendtsen úr H71 var heldur ikki við í dystinum týskvøldið, tí hann var so mikið óheppin undir venjing í Noreg at koykja sær fótin, og hann verður ikki at síggja aftur á vøllinum næstu 4 til 5 vikurnar, greiðir Henrik Gerster frá í telefonini úr Noreg.

Spurdur hvussu teir einkultu spælararnir stóðu seg í fyrra dystinum móti norðmonnunum, sigur Henrik Gerster. - Um eg skal nevna nakran spælara fram um aðrar, so má tað verða Johnny Durhuus á strikuni, sum spældi ein sera góðan dyst. Eg haldi tó, at allir framdu eitt gott avrik, men samstundis vóru alt ov nógv mistøk gjørd, sigur landsliðsvenjarin.

### Væntar betur úrslit í seinna dystinum

Undan seinna dystinum móti Noreg, sum var leiktur í gjárkvøldið, sigur Henrik Gerster seg vænta, at úrslitið í tí dystinum verður væl betur enn í tí fyrra. - Vit hava ein venjing á skránni tíðliga mikudagin, og tá fara vit at rætta tey mistøk, ið vit gjørdu í fyrra dystinum. Eg eri sannførdur um, at vit eru nóg mikið góðir til, at vit ikki eiga at tapa við meira enn eini fimm til seks málum móti hasum norska liðnum, sigur Henrik Gerster, sum sigur seg verða stak væl nøgdan við ferðina í Noreg. - Vit hava verið sera væl móttiknir, og alt er, sum tað skal verða. Venjingarumstøðurnar eru í topp, gistingarhúsið er fyrstaflokks, og ein bussur er allatíðina tøkur, tá ið vit skulu onkustaðnis, sigur danski landsliðsvenjarin hjá føroyska manslandsliðnum í hondbólti.

### Noreg-Føroyar 36-23(22-14)

**Noreg:** Geir Oustorp 9, Bård Nordhagen 6, Fredrik Dyve 5, Bjarte Myrhol 5
**Føroyar:** Ingi Olsen 5, Heini Hanusarson 5, Rókur Nielsen 3, Johnny Durhuus 3, Høgni Klein 3, John Zachariassen 2, Ragnar Stakksund 1, Regin Petersen 1
**Áskoðarar:** 307

## Verjuskifti í Fremad Amager

Liðskiparin hjá Andrew av Fløtum er farin til OB. Ístaðin hevur felagi fingið tilgongd av royndum superliguspælara

Í gjár gjørdist greitt, at liðskiparin hjá Fremad Amager ikki longur verður í felagnum.

Sterki verjuspælarin, Mikkel Blavnsfeldt, hevur nevnliga tikið av einum tilboði frá OB, sum fegnir vildu hava spælaran í sín hóp, og verjuleikarin tók av tilboðnum um at royna seg í superliguni.

Hinvegin hevur felagið longu tryggjað sær tilgongd í verjupartinum. Martin Nielsen, sum seinnu árini hevur spælt við FC Midtjylland, hevur í heyst roynt at fingið sáttmála við AGF, uttan at hetta tó er eydnast honum. Sum vit eisini nevndu í gjár hevur 31 ára gamli verjuspælarin so tikið av einum tilboði frá Fremad Amager.

**jm**